# Óneyðugt við útsølu á jólum

**HANDIL** Undanfarin ár hava danskir handlar havt útsølu áðrenn jól, fyri líkasum at fáa gongd í jólasøluna. Í ár hevur hetta ikki verið neyðugt, tí danir eru aftur farnir at brúka pening.

Snorri Brend

**Danmark:** Tann sum hevur gingið eftir eini danskari handilsgøtu, skal leita leingi eftir skeltum, ið boða frá jólaútsølu.

Í fjør og fyrraári vóru fleiri slík skelti at síggja, tí handlar høvdu fullar goymslur og vóru illa fyri. Nýtslan hjá fólki var so avmarkað, at okkurt mátti gerast.

– Men í ár er munandi øðrvísi, sigur Jens Birkeholm, stjóri í Dansk Detail við danska blaðið Børsen.

Teirra greining vísir, at færri hava jólaútsølu í ár. Og hjá teimum sum hava slíkar útsølur, er meiri talan um ein handilsliga avgerð, heldur enn eina tvungna avgerð.

## 8,2 milliardir

Jólasølan í 2008 varð merkt av einum brádligum falli í nýtsluni.

Hetta førdi við sær, at fleiri handlar stóðu við fullum goymslum sum skuldu og máttu seljast skjótast tilber. Lættasti mátin at bøta um hetta var at hava eina útsølu undan jólum.

Kreppan fekk tí danir at hyggja eftir handlum við teimum gulu útsølu-skeltunum.



KEYPA

*Hóast kreppu og arbeiðsloysi, siga handilsfólkini, at sølan í ár er á góðari leið her á landi*

*(Tilvildarlig mynd: Jens Kristian Vang )*

– Á heysti 2008 lógu handlarnir inni við stórum goymslum, tí eftirspurningurin var minkaður. Tá sóu vit á fyrsta sinni, at handlarnir fluttu januar-útsøluna fram til undan jólum, vísir Jens Birkeholm á.

Sama gongdin var í fjør, men her var meiri talan um ein handilsliga avgerð, í mun til 2008, tá handlarnir ikki høvdu annað í at velja.

– Tað sama ger seg galdandi í ár, hóast færri handlar gera tað. Tað eru tó framvegis tey sum meta, at tað er rætt fyri teirra konsept, og royna at fáa pening í kassan á henda hátt, sigur Dansk Detail.

Dansk Erhverv væntar í ár ein jólahandil svarandi til 8,2 mia krónur, í mun til 8 mia í fjør og 7,9 mia í 2008.

Enn vantar nakað í at røkka støðið frá 2006, sum var 9 mia krónur.

### Føroyingar keypa sum ongatíð áður

**– Kreppan sæst ikki aftur í tí sum fólk brúka á jólum, vísir ein kanning sum Kringvarpið gjørdi í farnu viku.**

**Útvarpsmaðurin, Høgni Mohr var týsdagin farin ein túr við mikrofonini í SMS í Havn, her hann hitti bæði handilsfólk og tey keypandi.**

**Í innslagnum varð víst á, at fleiri av handlunum hava selt nærum eins nógv og í fjør. Onkur teirra enntá meiri, enn um somu tíð í fjør.**

**Fólk flest vóru eisini ójøvn á máli, um tey brúka meiri pening til jólagávur í ár, í mun til undanfarin ár.**

**Samanumtikið kundi ein staðfesta, at føroyingar framvegis hava pening um hendi. Og framvegis keypa nógvar gávur undan jólum.**

---

# Hetta er mín *jólasangur*

## Barbara á Tjaldrafløtti: *Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*

- Mær dámar serliga væl henda jólasálmin. Sjálvt um boðskapurin er tann sami, sum í nógvum øðrum jólasangum og størri tónleikaverkum, so er hann nærverandi og skilligur, tí hann er føroyskur, sigur Barbara á Tjaldrafløtti í Havn.

Eg havi altíð hildið, eisini sum barn, at sálmurin var meira viðkomandi enn aðrir jólasangir. Sum dømi kann nevnast, tá sungið verður, at stormurin ýlir í gjáum, so ímyndaði eg mær fjøllini og gjáirnar á Borðoynni, sum eg sá hvønn einasta dag.

Seinni í sálminum verður sungið um Betlehem, har sólin upp rann og at hon at Føroya smáttum vegin fann. Aftur her verður sálmurin nærverandi, tí tað snýr seg um Føroyar.

Hinvegin kann man eisini siga, at sálmurin er úttrykk fyri, at Føroyar eru partur av alheiminum. Betlehem er fjart, sjálvt um tað er ein týðandi og kendur staður. Men tá yrkjarin soleiðis beinleiðis fær knýtt Betlehem og Føroyar saman, so gevur tað meining uppá ein annan og meiri gerandisligan máta.

Tað gerandisliga sæst eisini aftur í setninginum : "Jesus fer í smáttuna inn, blíð orð hann við gomul talar". Her er ikki so øgiliga nógv "glamour", sjálvt um sálmurin varðveitir tað tignaðarliga ella hátíðarliga.

– So kann eg eisini leggja afturat, at tá eg bleiv gift í Christianskirkjuni millum jól og nýggjár fyri fleiri árum síðan, høvdu vit valt at syngja henda sálmin. Tað ger eisini, at hann hevur serligan týdning, sigur Barbara á Tjaldrafløtti.



MEINING

*– Tá yrkjarin beinleiðis fær knýtt Betlehem og Føroyar saman, so gevur tað meining uppá ein annan og meiri gerandisligan máta, sigur Barbara á Tjaldrafløtti*

## *Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*

Nú ringja kirkjuklokkur so hátt
við himmalskum gleðiljóði:
Tað stundar móti jólanátt,
tá Jesus varð føddur hin góði.

2. Nú boðast friður víða um lond,
nú verður hin sjúki grøddur,
nú losna hørðu syndabond,
tí Jesus í nátt varð føddur.

3. Tó myrkur fyllir dalar og skørð,
og stormurin ýlir í gjáum,
so fjakkar Jesus enn á jørð
við sínum jólagávum.

4. Ei brim við strond, ei ísur í skor
kann Jesusi forða vegin;
hann stígur inn for fátæks mans borð,
har lítil er jólagleðin.

5. Ja, Jesus fer í smáttuna inn,
blíð orð hann við gomul talar,
hann klappar bleiku barnakinn,
av himni tá gleðin dalar.

6. Um sorgin veg til hjarta títt fann,
vár Jesus teg aldri gloymir,
og jólaboðið grøða kann
ta sótt, tú í barmi goymir.

7. Vit ung og gomul halda nú jól,
vár Jesus vil øllum hýsa,
hann er hin bjarta lívsins sól,
um allar ævir skal lýsa.

8. Í Betlehem tann sólin upp rann,
um heimin hon út mundi leita,
at Føroya smáttum veg hon fann,
tí tøkk vit tær, Jesus, veita.

9. Øll ung og gomul, samlist nú brátt
og lýðið á gleðiljóðið:
Tað var um halgu jólanátt,
at Jesus varð føddur hin góði.

Símun av Skarði.